framhald av síðu 9

Føroyakór, og um sama mundið høvdu lærarar nýggja musikkskúlans stovnað føroyskt symfoniorkestur. Tíverri fekkst tó ikki í lag tann samvinna millum Føroyakórið og Føroya Symfoniorkestur, sum skuldi verið so lagamanni; men kórið legði tá til brots við C-dur messu Beethovens, og við henni sum aðalverk og við stuðli frá Holte Ungdomssymfoniorkester, sum júst um tað mundið kom higar á vitjan, varð um mánaðarskiftið juni/juli 1984 skipað fyri fyrsta musikkfestivalinum í Norðurlandahúsinum, sum vit góvu heitið "Summartónleikadagar í Norðurlandahúsinum."

Hetta stevnutiltak varð endurtikið í nøkur ár eftir tað og hvørja ferð við Willi Gohl sum musikalskum ábyrgdarmanni.

Mong eru tónleikaminnini frá hesari tíð - verk sum glæsiligar motettir eftir Schütz, Bach og Händel, Jóhannespassiónin og Jólaoratoriið eftir J.S.Bach, Skapanin hjá Joseph Haydn, Kryningarmessa Mozarts og Carmina Burana hjá Carl Orff. Føroyakórið datt niðurfyri aftur, men umframt at Havnarkórið hevur átikið sær hesar uppgávur, hevur eisini samarbeiði verið um tær við onnur kór og við Føroya Symfoniorkestur.

Seinasta stórverkið undir leiðslu Willi Gohls var Händels Messias fyri jól í fjør. Undrandi fekk eg tá at vita, at hesum verki, sum flestøll framkomin kór regluliga hava á sínari skrá, hevði hann ongantíð áður arbeitt við. Spurdi hann tá, hvat verk hann hevði kosið sær, um hann skuldi valt sær eitt, sum serliga lá honum á hjarta. "Das wäre wohl Brahms Requiem", var spontana svarið. Hetta svar kom mær heldur dátt við.Vit høvdu júst havt "Ein deutsches Requiem" hjá Brahms í huga í aðrari ætlan, sum vit tá fyribils høvdu slept, tí uppgávan tókti okkum ov møtimikil, eisini tí at hon krevur fullbúgvið symfoniorkestur. Men tá ið so Willi Gohl fortaldi, at júst í hansara heimbýi Winterthur í Schweiz hevði Johannes Brahms evnað til eina útgávu av sínum "Deutsches Requiem" fyri ferhent klaver í staðin fyri orkestur, var málið greitt og avtalan gjørd.

Ein kann spyrja, hvat ið hevur fingið slíkan tónleikaúrmæling at koma soleiðis regluliga higar at arbeiða við okkum amatørum. Svarið man vera, at tónleikur sum so ikki bara fyllir hansara hug og dagliga virki, men hann er eisini hugtikin av viðurskiftum millum manna og tí ríkandi týdningi, sum tónleikur hann hava fyri tað einstaka menniskja og fyri samfelagið, um hann sleppur til tað.


Longu í barnaárum komu framúrskarandi tónleikagávur Willi Gohls til sjóndar, m.a. tá hann 14-ára gamal vann klaverkapping. Men í staðin fyri sum ungur beinanvegin at leita á konservatorium, fekk hann sær fyrst læraraprógv og helt síðan fram við hægri tónleikaútbúgving. Umframt klaver spældi hann eisini fiól, men serliga sum cembalistur hevur hann saman við fremstu kamarmusikarum í heimlandinum og uttanlands ferðast víða um lond.

Tó er tað fyrst og fremst sum dirigentur, at Willi Gohl seinnu áratíggjuni hevur verið gitið navn millum tónlistafólk. Sjaldan finnur tú tann fyrimyndarliga kór- og orkesturleiðaran í sama persóni, tí hesi bæði ljómlið hava ikki júst tørv á sama stuðli og leiðslu. Men ikki havi eg havt samband við nakran dirigent, ið sum Willi Gohl hevur bæði í sær, soleiðis at orkesturmusikarin kennir seg trygggan við hansara greiðu sløg, og kórsangarin fær tann berandi stuðul og íblástur, sum fær kórið at liva og ljóma.

Men í staðin fyri eina professionella karrieru sum instrumentalistur og dirigentur, sum hjá honum var so eyðsæð, valdi hann at leggja sál og orku í tónleikauppalingina, at "schaffen Nachwuchs", sum hann plagar at taka til, hetta at geva ungdóminum møguleikan og fáa tey ungu at taka við. Hann stovnaði og bygdi upp "Winterthur Musikschule und Konservatorium", sum á mangan hátt gjørdist fyrimyndarligur skúli. Gitin gjørdist hann um alt landið við sínari sendirøð í sambandi við útgávurøðina av sangbløðunum "Der Singkreis", ið framhaldandi verður endursend í sveitsisku loftmiðlunum. Hann, sum hevur upplivað W.Gohl og hansara "Offenes Singen", har hann á fólksligan hátt, men á hægsta listarliga støði fremur felagssang við stórari mannfjøld, dugir at skilja, at hann í slíkum virksemi verður mettur neyvan at hava sín líka í øllum heimi. Tí hava tað allastaðni frá verið boð eftir honum til slíkan felagssang og til at leggja øðrum lag á.

Virkin hevur Willi Gohl eisini verið í samvinnu millum tónleikastovnar, var í mong ár forseti og fram til nú nevndarlimur bæði í sveitsiska tónleikarameinfelagnum og í teirra musikkráð. Saman við m.a. týska vinmanninum Godtfried Wolters hevur hann verið undangongumaður til samvinnu millum kór í Europa, so sum hon triðja hvørt ár kemur til sjóndar í risastóru stevnuhaldunum Europa Cantat, t.e. Europa syngur. Henda kórrørsla byrjaði eftir seinna heimskríggj sum tiltak til vinarligt samband millum arvafiggindarnar Týskland og Frakland, hevur so við og við vaksið seg til eisini at fevna um lond uttan fyri Europa og er vorðin fyrimynd hjá Asia Cantat og slíkum felagskapum aðrastaðni í heimi. Eisini í hesum humanistiska virksemi er navnið Willi Gohl kent og virt víða um heim.

W. Gohl hevur nú sagt frá sær alt alment konsertvirksemi. Tí eru vit honum takksom fyri, at hann sum serliga vinagerð hevur vitjað út higar í Atlantshav at fyrireika og nú at framføra høvuðsverkið hjá Johannes Brahms "Ein deutsches Requiem", ein symfoni í kórlíki meira enn nakað



KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Hans Petersen
Postsmoga 98
350 Vestmanna

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: LØGTINGSMAÐUR

M	I	L	L	I	A	R	D	I	R	N	A	R		M	A
F	L	Ø	G	G		I		L	E	S	N	A	Ð	U	R
214	T	G	S	L	U	R	P		O		D	N		R	A
B		T		A	G		I	L	L	B	Ø	N	I	R	
L	E	I	Ð	R	E	G	L	A		E	V	V	O	I	A
O	G	N				Á	T	T	A	T	I	A	L		N
K	O	G	A	N	E		A	A		R	N		A	R	A
K		S	N	A	R	A	R		R	I	G	A			N
S	Æ	L	A	N		I	N	N	A	N		R	I	P	A
T	V	Ø		T	E	R	I	R		G	I	M	M	I	
U	I	G		E	V	E	R	T			M	A	A	S	
Ð		I	L	S	E				K	J	A	R	T	A	N
U	G	R	A		N	A	T	R	I	U	M		R	N	A
L	J	N		R		R	A	I	S	A			A		I
I	N	A	R	I		N	K	T		N	E	T		K	R
N	A	R	K	O	T	I	K	A			T	Í	K	I	N

Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

Loysunarorð: **215**

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur:

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Barnarímur** - *Hans A. Djurhuus/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Kalr N. Hansen týddi*

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Grønur var dalurin** - *Richard Llewellyn/ Knút Olsen týddi*
- ❑ **Tit bygdu hetta land - Arbeiðsmarknaðurin** - *Jákup Pauli Strøm*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Frumsagnir** - *Neil Philip/Amy Tausen týddi*
- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt